Skilja politikkarar ikki uppgávuna?

Lokalpolitikkurin spillir okkum samfelagið

»- At menn seta sum fremsta mál at sæta sjálvum sær og sínum hevur sera óhepnar avleiðingar fyri samfelagið. Hetta er tíverri tað sum stendur sum fremsta mál hjá nógvum politikkarum. Nógv dømi eru um prestisjuprosjekt sum verða trumfað igjøgnum, uttan at hugsað verður um, hvat samfelagsgagn hetta kann gera. Vit kunnu nevna undirsjóvartunnilin um Vestmannasund og sjúkrahúsútbyggingina á Tvøroyri...

Taka allir føroysku flokkarnir sær ikki um reiggj nú, og rudda upp, soleiðis at landspolitikkur verður fordur, legst alt samfelagið í skelja«, skrivar Eirikur Lindenskov, formaður í Sosialistiskum Ungmannafelag í Føroyum m. a. í sjónarmiðnum í dag.

At sigga *sandar* politikkarar í blóðunum stinga út í kortið tann politikk, teir halda skal rekast í samfelagnum, er vorðið eitt sjálsamt fyribrigdi í Føroyum. Alt ov lítið alment orðaskifti er um dagsins spurningar, og alt fleiri løgtingsmenn gera persónlig upplop við eittans endamáli - at koma sær fram í fjølmiðlunum.

Hetta er sera óheppið og rættuliga samfelagsskaðiligt. Hetta ger at vit fáa sera ótrygg politisk viðurskifti og rættuliga trupult verður at arbeiða í einum hugsjónarligum, politiskum flokki, sum javnaðarflokkurin átti at verið.

Í øðrum londum hava tey hugtakið »pampari«. Tað er ein fakfelags- ella javnaðarmaður sum bert hugsar um persónligan vinning - at koma sær fram. Sum politisku viðurskiftini nú eru, kunnu vit tosa um »pamparapolitikk« tá hann er verstur - løgtingsmenn hugsa bert um seg, síni og egna valdømi síit, heldur enn at gera eitt miðvíst arbeiði, landi og fólki at gagni.

Landsstýrið einki gjørt enn!


Undir seinasta landsstýri varð nógv kjakað her í blaðnum, um tann politikk, landsstýrið fordi. Sosialurin hevði eina ræðusøguna fyri og aðra eftir um, hvussu fólk flýddu av landinum undan pantifúta og arbeiðsloysi. Hesar søgurnar eru vorðnar færri og færri. Hetta átti at boðað frá góðum - at tað var vorðið betri at liva í Føroyum - men er tað nú tað?

- Als ikki!

Vit høvdu satt at siga væntað, at tá flokkur okkara kom so sterkur á ting eftir valið seinasta, so skuldu vit skjótt siggja úrslit av vallyftum okkara. Vit høvdu fyrst og fremst væntað at landsstýrið fór at gera nakað veruligt fyri at fáa fólk aftur í arbeiði *beinanvegin*. (tað høvdu vit jú lovað). Men arbeiðsloysið veksur støðugt.

Hvat er tað so landsstýrið tekst við?

- Jú, teir spara. Tað hava teir gjørt okkum greitt. Landið er í kreppu og vit mugu øll taka okkara part til tess at fáa landið á føtur aftur fíggjarliga. Tað er so alt í lagi við tí. Men tað er okkurt annað, sum ørkymlar.



Eirikur Lindenskov

Ongan tunnil í hesari øldini

Seinastu tíðina hevur kjakið um undirsjóvartunnilin um Vestmannasund tikið seg upp aftur. Teir tríggir, sum umboða Vágoynna í landsstýri og á tingi hava allir sum felags aðalmál at fáa hesa verkætlan framda. Teir siga allir við ein munn, at hetta *skal* fremjast nú og »bedýra« at hetta fíggjarliga vælber til.

Um hesin tunnil so kostar 200, 300 ella 400 milliónir, so kann hvørt mansbarn siggja, at fíggjarligu umstøðurnar als ikki eru til eitt slíkt prestisjuprosjekt nú. Men vit, sum mæla ímóti, verða løgd undir at vilja avtofta Vágoynna. Vit *»stríðast fyri at kvala alla nýhugsan og framburð í Vágoynni«* vil Frank løgtingsmaður vera við.

Stór orð, kunnu vit siga.

Vit kunnu sjálvandi altíð tosa um, hvørt ein undirsjóvartunnil í longdini roynist betri búskaparliga enn samband sjóvegis. Men vágafólk og politikkarar mugu gera sær greitt, at tey fáa *ongan* tunnil í hesi øldini. *Fíggjarvánirnar eru ímóti hesum!*

Eingin megnar at kostnaðarmeta

Eisini kann sigast, at tað er alt ov framligt av trimum vágamonnum at krevja at skuldarbinda okkum, børn okkara, ommu- og abbabørn okkara og nøkur ættarlið aftur at fyri at útvega Vágoynni fasta sambandið og fyri at bjarga onkran løgtingssessin.

Vit mugu eisini minnast til at vit vita so ómetaliga lítið um arbeiðið við undirsjóvarunli í Føroyum. Vit vita, at gróflágimar sunnanfyri liggja hægri enn norðanfyri í Føroyum. Tí kann hugsast, at grótið undir Vestmannasundi kanska minnir um gróið í Suðuroy. Hugsa vit okkum, at gróið undir Vestmannasundi er eins vánaligt, sum í Sumbiartunnlinum, so er eingin sum við vissu kann siga, hvat ein slíkur tunnil kostar - hetta megna heldur eingir norðmenn!

Sjúkrahús og bygdamenning

Eitt annað mál, sum hevur verið nógv frammi síðani hendan samgongan varð skipað, er sjúkrahúsmálið. Kjakið um sjúkrahús hevur altíð verið sera kensluborið. Fórt hevur verið fram, at annaðhvørt studlar tú menningini av smærru sjúkrahúsunum ella ætlar tú at niðurleggja tey og so ynskir tú bert at havnarfólk skulu hava trygg sjúkrahúsviðurskifti.

Hetta er ikki annað enn undirbrotligt møsn.

Tosa vit um menning, so kann ikki sigast annað enn at rættulig »inflasjón« er komin í fyribrigdið »bygdamenning«.

Sjónarmiðini um at varðveita og útbyggja smærru sjúkrahúsini eru ikki partapolitisk. Hyggja vit nærmari, so siggja vit at tað eru politikkarar úr Klaksvík og av Tvøroyri sum streingja mest á. Hví so man vera kunnu vit øll ímynda okkum.

Breyðpolitikkarar - landspolitikkarar?

Í Sosialinum fríggjadagin hevur Sverri Midjord drúgva grein, har hann greitt vísir, at *hann* undir valstríðnum hevur sagt seg ynskja at Suðuroyar Sjúkrahús verður útbygt soleiðis, sum ætlanin hevur verið. Sverri lovaði veljarunum hetta og hann setti hetta sum treyt fyri stuðli sínum fyri hesi landsstýrissamgongu, sigur hann.

Nei men harra mín Gud góði Sverri! Hasum taka vit als ikki undir við. 120 milliónir krónur fyri eina óneyðuga sjúkrahúsútbygging á Tvøroyri er alt ov nógv. Tá menn í reinum álvara koma við slíkum, so kunnu vit ikki annað enn misteinkja teir fyri at arbeiða fyri sjálvum sær og sínum, heldur enn at hugsa um hvat gagnar best landi og fólki.

Einki fantilsi

Skomm at siga, men veruleikin er tann at sjúkrahúsmálið er vorði eitt prestisjumál hjá Norðoya- og Suðuroyatingmonnum.

Teir halda helst at hetta er ein liður í »bygdamenningini«. Hetta er ein stór misskiljing. Ein stórur partur av »bygdamenningini« (hvat tað enn merkir) hevur verið »brúktur« av ávísum politikkarum til at sæta sær og sínum. Als einki hevur verið hugsað um hvat gagnar landinum best, men hvat hevur kunna útvegað ávísum lokalpolitikkarum flestar atkvøður. Hetta kann vera tað sum er ein tann størsta orsøkin til tað neyðars støðu, land okkara fíggjarliga er komið sær í. Eingin heildarætlan er gjørd - roynt hevur verið at »býtt javnt« millum økini.

Stutt sagt: Einki fantilsi hevur verið á!

Niðurleggið smærru sjúkrahúsini

Hvat sjúkrahúsmálinum viðvíkur, so er eingin ivi um, at besta loysnin var at niðurleggja tey smærru sjúkrahúsini. Tey kundu verið nýtt til ellis-, røktar og umlættingarheim, og sjálvandi eisini virkað sum sjúkrahús við føðideil og, skaðastovu, til eftirvágerð o. a., *í tann mun, sum neyðugt var!* Truplari uppgávur kundu verið fluttar til Landssjúkrahúsið við einum vælútbygdum tyrlusjúkraflutningi.

Keypið tyrlu til sjúkraflutning

Framkomna tøknifrøðin hevur fórt við sær, at tað í dag fáast tyrlur, sum megna at flúgva í nógv verri líkinum, enn tær tyrlur vit nú hava kunna. Hugsa vit okkum at Landssjúkrahúsinum varð útvegað eina slíka tyrlu, mannaða við neyðugum læknum og sjúkrasystrum, so høvdu allir íbúgvar landsins verið nógv tryggari, enn teir eru í dag. Eisini hevði hetta verið so ómetaliga nógv biligari.

At tvíhalda um at vit skulu hava trý sjúkrahús, bert fyri at varðveita nøkur arbeiðspláss, er bjóskaparligt sjálvmorð. Tá hevði tað verið nógv biligari at givið fólki pening fyri als einki at gjørt.

Miðsavning er framtíðin

Tá framstandandi politikkarar í ramasta álvara fara at tosa um at leggja serlæknaøkir út á smærru sjúkrahúsini, eiga ávaringarklokkurnar at ringja. Ein og hvør er greiður um at hetta bert økir um útreiðslurnar og ikki petti um trygdina - tvørturímóti! At nýta milliónoman á milliónfyri at spjaða serviðgerðina hevur bara tað við sær, at *fleiri* sjúklingar skulu flytast *longur*, at læknarnir fáa minni royndir og skapar ein óneyðugan tørv á ymsum tænastum, sum kundu verið gjørdar undir einum á Landssjúkrahúsinum.

Vit mugu gera okkum greitt, at besta loysnin er at miðsavna alla serviðgerð og mestu sjúkraviðgerð. Hetta ger bæði at vit fáa eina betri tænastu og at hetta kann gerast fyri kanska helvtarprís. Skal argumentasjónin um at varðveita smærru sjúkrahúsini halda, so skulu vit byggja fýra sjúkrahús aftur at: Í Vágum, í Norðstreymoy, í Eysturoy og eitt á Sandi.

Bygdamenningarherferð in, ella »havnarkomplekxið«, hevur havt so stóra ávirkan á føroyskan politikk, at eingin tingmaður enn hevur torað at talað um eina slíka niðurlegging av smærru sjúkrahúsunum, hóast tað helst hevði verið skilabesta, bíligasta og tryggasta loysnin fyri landið og fólkið.

»Eg vil, gev mær, eg skal!..«

»Eg-vil-hava«- politikkurin er ikki nóg góður longur. Nú er tað *»eg-skal-hava-annars-slíti-eg-samgonguna«* - politikkurin sum aftur er settur í hásæti.

Tápuligt og øvdileggjandi fyri føroyska samfelagið.

-Tað kann tykjast heldur framligt av trimum vágamonnum at krevja at skuldarbinda okkum, børn okkara, ommu- og abbabørn okkara og nøkur ættarlið aftur at fyri at útvega Vágoynni fasta sambandið

Sum rosinan í pylsuendanum kemur Vilhelm, løgtingsmaður, *aftur* og royndir seg sum 17. mannin.

Nú er ovbodið. Er skilið veruliga so vánaligt, at slíkir »smálutir« ikki kunnu fáast í rættlag innanhýsis, so er tíðin komin hjá fleiri politikkarum at leggja frá sær.

Tann »heiti sessurin« góður at hava

Tað tykist ikki sum um tingmenn eru greiðir yvir hvørja uppgávu vit hava givið teimum, við at valt teir inn á ting. Hetta er ikki eitthvørt arbeiði - ella nakað hjáputur! Teir »eiga« heldur ikki tingsessin, hóast tað mangan tykist so. Tá tingfólk eru burturstødd - ella verða vald í landsstýri - so eiga tey, um tey hava nakra respekt fyri tingarbeiðinum og veljarunum, at lata næsta fólk á listanum taka sætið. Tá tosa vit ikki um valdsmisnýtslu ella valdsgirnd, men um ábyrgdarfult, virðiligt arbeiði.

Javnaðarflokkurin er størsti flokkur á tingi. Um Marita, eins og hinir seks landsstýrismenniniir, eisini letur øðrum tingsessin, so hevur flokkurin 14 fólk á tingi og í landsstýri. Hetta, saman við einum vælvirkandi floksapparati, átti at givið møguleikar fyri framsóknum arbeiði.

Fatið Føroyar sum EINA heild!

Skulu vit hava skil aftur í hesum landi, so krevur tað at teir ráðandi taka í egnan barm. Allir flokkar mugu til verka - at rudda upp í egnum flokki. Tað ber ikki til at vit bert hava lokal politikkarar umboðaðar á tingi. Vit mugu hava fólk, sum umboða okkum øll - øll sum búgva í Føroyum. Vit mugu siggja landið sum eina heild og ikki sum sjey sjálvstøðugar heildir ella 50 sjálvstøðugar kommunur, sum einki hava við hvørja aðra at gera.

Uppskotið hjá Jógvani, landsstýrismanni, um at leggja kommunur saman er vert at hugsa um. Uppskotið hjá Karini og Maritu um at skipa alt landið sum eitt valdømi átti aftur at komið fram á tingbordið...



»Eg-vil-hava«- politikkurin er ikki nóg góður longur. Nú er tað »eg-skal-hava-annars-slíti-eg-samgonguna« - politikkurin sum aftur er settur í hásæti.



- Besta loysnin er at miðsavna alla serviðgerð og mestu sjúkraviðgerð. So fáa vit eina betri og biligari tænastu. Skal argumentasjónin um at varðveita smærru sjúkrahúsini halda, so skulu vit byggja fýra sjúkrahús aftur at. Í vágum, í Norðstreymoy, í Eysturoy og eitt á Sandi.



SJÓNARMIÐ